# Kjak



Archibald Black

## Hvat er endamálið?

Tað snýr seg ikki bara um sambýlið úti í Svínoy. Hetta snýr seg um, hvussu Klaksvíkar kommuna verður rikin, og hví? Eg veit væl, at eg havi verið provokerandi við onkrum av mínum útsagnum, men tað var fyri at varpa ljós á málið og fáa eitt kjak í gongd. Um tað var rætt ella skeivt, vil tíðin vísa. Klaksvíkingar hava sjáldan, tað eg veit um, kjakast opið í fjølmiðlunum um avgerðir, býráðið hevur tikið.

Mín vón er, at vend er komin í. Í dag er lættari at koma fram við viðmerkingum. Vit hava t.d. fingið facebook. Fjølmiðlarnir fylgja eisini við á facebook og hyggja at, hvat fyriferst.

### Fríggjaríið

Tá ið fyrrverandi býráðið fríggjaði til svínoyingar og tók undir við sambýlinum, løgdu kommunurnar saman. Núverandi býráð hevur síðani staðfest samtyktina. Sjálvandi skulu gjørdar avtalur haldast, men núverandi býráð átti at tikið samráðingar upp við svínoyingar, um at funnið eina aðra loysn, eina, ið hevði betri møguleika at eydnast. Bara sjálvur raksturin fyri eitt sambýli yvir eitt 10 ára skeið, til 8 búfólk, kostar meira enn 20 mill. kr., væl at merkja, um tað var í Klaksvík, men tað er tað jú ikki! Fyrrverandi býráð fríggjaði eisini til Hvannasunds Kommunu, hesaferð varð egnt við 10 tals mill. kr., tíbetur fekk Klaksvíkar Kommuna krakk. Eg dugi illa at ímynda mær støðuna í dag, um fríggjaríið hevði eydnast.

Spurningurin er so, um kommunan hevur lært nakað av gjørdum feilum, eg vóni framtíðin fer at vísa, at so er.

### Fortíð ella framtíð

Klaksvíkar Kommuna stendur í dag framman fyri teimum størstu avbjóðingunum nakrantíð, hetta kann ikki undirstrikast nokk, tað skulu sera dugnalig fólk til at venda gongdini. Vit eru í dag umleið 200 fólk færri, enn tá ið undirsjóvartunnilin lat upp, og allar forsagnir siga, at gongdin fer at halda fram. Stórur partur av útbúna ungdóminum rýmir úr Klaksvík, útlitini eru óhugnalig. Fyri fleiri av okkara tilkomnu borgarum, er valið lættari enn hjá KK, vit kunnu jú flyta til Havnar ella enn longur burtur. Børnini, ið nú eru vaksin, eru ikki her longur!

### Hvar er visiónin?

Marketminds hevur gjørt eina kanning fyri K.K., ið útgreinar trupulleikarnar, býurin hevur. Her eru fleiri greiðar ábendingar. At ignorera hesa kanning, vildi verið av størstu mistøkum, hetta býráðið hevði gjørt.

Skúrurin í miðbýnum er eitt talandi dømi. Tá ið býráðið valdi ikki at taka niðurstøðuna hjá innlendismálaráðnum til eftirtektar, varð eitt keðiligt mistak gjørt. Signalið býráðið hervið sendi, fær óivað størri avleiðingar enn roknað varð við. Tað, ið verri er, býráðið segði nei takk til framtíðina.

Í inspiratiónsætlanini "Klaksvík, ein býur fyri øll" varð tikið hædd fyri eini bátamarinu heimanfyri lítlu kei eins og møguleika fyri hotelbygging og einum livandi og fjølbroyttum umhvørvi við havnalagið. Um røktarheimið varð flutt eitt sindur longur heim, vórðu hesir møguleikar varðveittir. Hetta er nakað, ið framvegis kann verða gjørt. Tørvur á bátaplássum er longu stórur og verður neyvan minni sum frá líður, tað verður seg til fast pláss, bátafestivalar umframt onnur vitjandi. Vónandi endar hetta ikki við "business as usual".

### Kostnaðurin

24. mars í ár var tað eitt ár síðani borgarafundin í Badmintonhøllini, har inspiratiónsætlanin, "Klaksvík, ein býur fyri øll", varð løgd fram. Hetta er higartil besta boð upp á, hvussu vit taka við avbjóðingunum, framtíðin hevur at bjóða. Framløgan varð sera væl móttikin, og birti vón í fólkið.

Higartil hevur kommunan brúkt millum 30-40 mill. kr. upp á ein miðbý, ið enn ongan veg er komin. Skal hetta halda fram?

Rætt ella skeivt?

Lívið er eitt val við avgerðum. Hvør, ið var røtt, og hvør, ið var skeiv, vil tíðin vísa. Ein av tykkara avgerðum kann tí stevna tykkum beint aftur í nakkan, tá ið tit minst vænta tað, soleiðis er lívið. Tískil er sera umráðandi at gera arbeiðið til lítar.

Burtur við vanahugsan inn við nýhugsan. " Think outside the box".

---

Jan Asbjørnsson Joensen
*landsnevndarformaður*

## Sjálvstýrisflokkurin vil útbúgving

*og vit meina tað!*

Nú hava stóru flokkarnir havt landsfund, og báðir leypa aftan á Sjálvstýrisflokkinum, uttan tó at nevna hann. Nú siga bæði Samband og Tjóðveldi, at vit skulu hava fleiri lestrarpláss í Føroyum.

Hetta er sjálvandi frálíkt. Men søgdu ikki báðir flokkarnir okkurt líknandi til síðsta val, tá ið øll tosaðu um altjóða universitet og bleyt virði?

Bæði Samband og Tjóðveldi hava sitið í samgongu hetta valskeiðið, men hvørgin hevur gjørt nakað nevniverdugt við lestrarpláss. Rætt er, at vit eru farin frá nærum ongum til eitt sindur av hægri útbúgving í Føroyum, men hvør strikaði neyðars 5 mió av játtanini hjá setrinum: fíggjarnevndin við Sambandi og Tjóðveldi á odda, tí pengarnir aftur skuldu brúkast til asfalt og betong.

Sjálvstýrisflokkurin lovar ikki nógv, men heldur síni vallyftir. Í valfaldaranum til seinasta val skrivaðu vit:

"Vit skulu skipa hægri útbúgving og gransking í Føroyum. Málið skal vera, at øll skulu kunna byrja og enda vanligar hægri útbúgvingar í Føroyum. Føroyskar útbúgvingar skulu vera so góðar, at útlendingar koma til Føroya at lesa."

Hetta meintu vit og hetta meina vit. At Samband og Tjóðveldi aftur siga seg vilja fylgja eftir er frálíkt, men vit halda altso okkara vallyftir, so um tit eisini meina tað, so geru tit tykkum klárar, at fíggja eina munandi hækking av lestrarplássum á hægri stovnum í Føroyum, umframt at eftirskúli og skúladeplar kring landið við miðnáms og yrkisútbúgvingum skulu skipast.

Góðir útbúgvingarmøguleikar og ein búðskaparliga burðardygg fiskivinna eru bestu og fremstu fortreytir fyri menning og framburði.



Frank Davidsen
*Sørvágur*

## Lat Fólkaflokkin slíta

Aftur í ár roynir Fólkaflokkurin at halda seg uttan fyri semjuna um fíggjarkarmin til tess at sleppa undan at taka ábyrgd. Hinvegin so ætlar fíggjarnevndarformaður floksins at nýta sama taktikk sum undanfarni fíggjarnevndarformaður, nevnliga at hoyggja semjuna um fíggjarkarmin soleiðis, at semjan hvørki er fuglur ella fiskur, tá fíggjarnevndin ber uppskotið niðan aftur í Løgtingið.

Tað er ein sera rámandi oddagrein, ið Eirikur Lindenskov hevur í Sosialinum í kvøld, har hann millum annað ger vart við, at hvørki Edmund Joensen, Høgni Hoydal ella Jóanes Eidesgaard megnaðu ella tordu at seta stólin fyri hurðina, tá Anfinn Kallsberg var formaður í Fólkaflokkinum.

Sitandi formaður Fólkafloksins hevur hvørki sama format ella styrki sum fyrrnevndi formaður floksins. Síðan Jørgin Niclasen tók við sum formaður, hevur flokkurin ikki bara gingið í tvíningum, tí afturat tí hevur Poul Michelsen meldað pass og tikið seg úr flokkinum, sum hann hevur tænt í 40 ár.

Eftir útsøgnunum frá løgmanni og fíggjamálaráðharranum er tað ein stórur spurningur, um tíðin hjá sitandi formanni Fólkafloksins nærkast endanum, soleiðis at hann nú í berari desperasjón taktiskt roynir at fáa tað til at síggja út, sum hann framvegis er tann sterki maðurin í flokkinum og ikki Annika Olsen og Jacob Vestergaard, landsstýrisfólk floksins.

Til seinast í oddagreini í Sosialinum stendur:

»Aksel V. Johannesen kann nú prógva sítt virði, sum nýggjur floksleiðari. Hann kann prógva, um eisini hann ræðist Fólkaflokkin, tað verður hansara politiska sveinastykki.«

Sjálvur haldi eg, at hesaferð eigur stólurin bæði væl og virðiliga at vera settur Fólkaflokkinum fyri hurðina, tí hetta er sum so nógv annað enn eitt bluffnummar frá sitandi formanni floksins.